# LEIKSKRÁ

3. UMFAR

23. MAI 2020

BLAÐ NR. 02



MYND: JUUL'S FOTO

KLAKSVÍKAR ÍTRÓTTARFELAG
STOVNAÐ 24.8.1904

HAVSBRÚN

## VÆLKOMIN TIL DYST Í FLØTUGERÐI

betri
DEILDIN

# Innihald


Dysturin í dag ..... 4
Hagtøl fyri Betri-deildina hjá monnum ..... 8
Liðuppsetingin hjá ÍF og KÍ ..... 10
Leikarin hesaferð ..... 14
ÍF í hesi løgnu tíð ..... 18
Seinasti dysturin ..... 22
ÍF-sangurin ..... 24



**ÍF**, Ítróttarfelag Fuglafjarðar, 530 Fuglafjørður, tel. 228771, if@if.fo, www.if.fo.
**Útgevari:** ÍF-fótbóltur. **Ábyrgd:** ÍF-fótbóltur. **Uppsetan:** Maibritt P. Bærentsen.








**MYNDIR:** PALLI VANG



# HAVSBRÚN

P/F Havsbrún • P.O. Boks 81 • 530 Fuglafjørður • tel. 41 44 00 • fax 41 44 01
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fi



TEKST: EIVIN BREIÐASKARÐ

# Dysturin í dag

Í dag eru tað føroyameistararnir frá 2019, sum eru okkara mótstøðulið í Fløtugerði. Tað varð eitt sera sterkt besta lið úr Klaksvík, sum í fjør vann FM, og harvið skapti stóra gleði til allar teir mongu KÍ-fjepparanar, sum hava hungra eftir einum FM-heiti í 20 ár.

ÍF-liðið er nógv broytt síðani kappingarárið 2019, har tað gekk minni gott, og liðið einans fekk 6 stig fyri 27 dystir. Nýggjir dugnaligir leikarar í hópinum og eitt venjarapar, sum nú hevur nakað meir av royndum, gevur vón um fleiri stig og eina betri plasering til okkara dreingir. Tað sær gott út higartil, sjálvt um tapti heimadysturin ímóti HB kanska varð eitt av einum vónbroti fyri leikarar og viðhaldsfólk.

KÍ hevur eisini skift út í hópinum í mun til í fjør, men stamman á liðnum er mestsum óbroytt, og av tí sama so kann roknast við, at KÍ fer eftir føroyameistaraheitinum aftur í ár, og alt annað er ein fiasko fyri eitt felag sum satsar so stórt við leikarainnkeypum, sum onnur feløg bert kunnu droyma um.

Eg vænti mær ein javnan dyst í dag, har KÍ fer at byrja dystin sum eitt ódnarveður og fer at leggja stórt trýst á okkara menn frá byrjan av. Klárar ÍF at standa ímóti fyrstu 10-15 minuttirnir, og vísa rætta hugburðin og viljan, so kann dysturin broytast og venda til okkara fyrimun.

Fáa vit skapt líka nógvar málkjansir sum ímóti HB, so er tað møguligt, at í dag fáa heimaáskoðararnir fyrsta heimasigurin í umleið 18 mðr. at síggja.

Tað ræður um at fáa sett seg í respekt hjá KÍ-leikararnum beinanvegin, og tí er ikki at smæðast í nærdystunum. Hvør nærdystur telur og tí er umráðandi fara 100% inn í taklingarnar og vinna nærdystirnar uppá tann mátan.

Tað er á heimavøllinum í Fløtugerði, at flestu stigini skulu vinnast, og í dag er enn ein kjansur at fáa tann málsetningin gjørdan til veruleika.

Kom nú dreingir......takið KÍ á bóli og fái 3 stig í hús. Tað hevði verið stuttligt.

*Góðan dyst*



INTERSPORT
Thomas Dam ítróttur




Thomas Dam Intersport
Bøgøta 1, Klaksvík
455320

Thomas Dam Intersport
Jónas Broncksgøta 21, Tórshavn
355300

Thomas Dam Intersport
Glyvravegur 38, Glyvrar
447399




the athlete's foot

Niels Finsensgøta 5, 100, Tórshavn, 355310
@theathletesfoottorshavn

SPEKT
løggildir grannskoðarar

**Tórshavn**
Staravegur 17
Tel. 34 34 34

**Klaksvík**
Stangaskákið 1
Tel. 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo




Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo



TÍTT FLUTNINGSFELAG

SAMSKIP


Heildaveitari
til sjóvinnuna
Vit umboða hesi merki
Cummins
Bátamotorar
3M PELTOR
Oyravernd
EXIDE BATTERIES
Akkumulatorar
Fronius
Sveisiútgerð, elektrodir, gass
Mobil
Smyrjiolja
Dräger
Filtur, maskur og gassmátarar
CREWSAVER
Solas góðkendir bjargingarvestar og draktir
DSB RFD
Bjargingarbátar
Mullion
Flóti og yvir-livilsisdraktir
· Oljuklútar
· CO2 og onnur køligass
· Sløkkiútgerð og tænasta
Noreqfender
NOREQFENDER
Fønix
Mykinesgøta 8 · Boks 18 · FO-110 Tórshavn · Tel 31 19 09

1. UMFAR

KELDA: FAROESOCCER

## Betri-deildin Menn

betri DEILDIN

| NR | LIÐ | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | NSÍ | 2 | 2 | 0 | 0 | 6 | 1 | 5 | 6 |
| 2 | B36 | 2 | 2 | 0 | 0 | 5 | 0 | 5 | 6 |
| 3 | HB | 2 | 2 | 0 | 0 | 4 | 1 | 3 | 6 |
| 4 | Víkingur | 2 | 1 | 1 | 0 | 5 | 2 | 3 | 4 |
| 5 | ÍF | 2 | 1 | 0 | 1 | 3 | 4 | -1 | 3 |
| 6 | KÍ | 2 | 1 | 0 | 1 | 2 | 3 | -1 | 3 |
| 7 | AB | 2 | 0 | 1 | 1 | 0 | 3 | -3 | 1 |
| 8 | TB | 2 | 0 | 0 | 2 | 2 | 5 | -3 | 0 |
| 9 | Skála | 2 | 0 | 0 | 2 | 3 | 7 | -4 | 0 |
| 10 | EB/Streymur | 2 | 0 | 0 | 2 | 0 | 4 | -4 | 0 |

*Niðurflytingar strikan til 1. deild*

### 3. UMFAR

| |
|---|
| **ÍF - KÍ** |
| B36 - Skála |
| AB - HB |
| Víkingur - NSÍ |
| EB/Streymur - TB |

### 4. UMFAR

| |
|---|
| **NSÍ - ÍF** |
| Skála - AB |
| TB - B36 |
| KÍ - EB/Streymur |
| HB - Víkingur |

TOPP 10

KELDA: FAROESOCCER

## MÁLSKJÚTTAR í Betri-deildini

| NR | NAVN | MÁL |
|---|---|---|
| 1 | Uros **Stojanov (ÍF)** | 3 |
| 2 | Adrian **Justinussen (HB)** | 2 |
| 3 | Aron **Knudsen (NSÍ)** | 2 |
| 4 | Jóannes **Bjartalíð (KÍ)** | 2 |
| 5 | Meinhard **Olsen (B36)** | 2 |
| 6 | Rógvi **Joensen (TB)** | 2 |
| 7 | Andreas **Jacobsen (Skála)** | 1 |
| 8 | Árni **Fredriksberg (NSÍ)** | 1 |
| 9 | Betuel **Hansen (NSÍ)** | 1 |
| 10 | Finnur **Justinussen (Víkingur)** | 1 |


betri.fo
Betri tannár
Til tín millum 13 og 17 ár
- Kort
- Netbanki
- Nýtslukonta
- Uppsparingarkonta
- Boðtænasta
Fá ein ryggsekk, tá tú bíleggur títt fyrsta kort
Vitja eina av deildum okkara
betri

LIÐINI Í DAG

# 3. UMFAR

| ÍF | | betri deildin | | KÍ |
|---|---|---|---|---|
| Tóri T. **Traðará** (M) | 1 | | 1 | Kristian **Joensen** (M) |
| Jan Ó. **Ellingsgaard** (L) | 3 | | 3 | Ísak **Simonsen** |
| Jens **Joensen** | 4 | | 4 | Deni **Pavlovic** |
| Karl **Løkin** | 6 | | 5 | Jesper **Brinck** |
| Dánjal **á Lakjuni** | 7 | | 6 | Alessio **Hyseni** |
| Uros **Stojanov** | 8 | | 7 | Patrik **Johannesen** |
| Filip **Djordjevic** | 9 | | 8 | Jákup B. **Andreasen** (L) |
| Ari Ó. **Ellingsgaard** | 10 | | 9 | Páll **Klettskarð** |
| Hákun **Edmundsson** | 11 | | 10 | Jóannes **Bjartalíð** |
| Jákup **N. Olsen** (M) | 13 | | 11 | Jonn **Johannesen** |
| Gundur E. **Petersen** | 14 | | 15 | Gulak **Jacobsen** |
| Bogi A. **Løkin** | 15 | | 16 | Meinhardt **Joensen** (M) |
| Sámal **Joensen** | 17 | | 17 | Ole Erik **Midtskogen** |
| Pól Jákup **Lundsbjerg** | 18 | | 18 | Ólavur **Niclasen** |
| Rói **Róin** | 19 | | 20 | Børge **Petersen** |
| Jóhan **Petersen** | 20 | | 21 | Boris **Dosljak** |
| Tóri **N. Olsen** | 21 | | 22 | Oddmar **Færø** |
| Sjúrður Pauli **Nielsen** | 22 | | 23 | Jóannes K. **Danielsen** |
| Andy Ó. **Olsen** | 23 | | 25 | Steinbjørn **Olsen** |
| Milos **Budakovic** (M) | 25 | | 27 | Óli Eyð. **Poulsen** |
| Ólavur **Larsen** | VENJARI | | VENJARI | Mikkjal **Thomassen** |
| Hans Jørgen **Djurhuus** | VENJARI | | HJÁLPARVENJ. | Sjúrður **Jacobsen** |
| Pauli **Jarnskor** | MÁLMANSVENJ. | | MÁLMANSVENJ. | Geza **Turi** |
| Milan **Svojic** | HJÁLPARVENJ. | | HJ.MÁLMANSVENJ. | Heri **Ósa** |
| | | | FYSISKUR VENJ. | Gudmundur **Danielsen** |

**LIÐLEIÐARAR:** TRÚGVI NESÁ, ÓLAVUR ELLINGSGAARD, POUL N. MIKKELSEN OG PALLI VANG
**FYSIO:** HANUS ELIASEN, ÁLVUR HANSEN OG JÓNFRÍÐ HANSEN

**LIÐLEIÐARAR:** REGIN SIVERTSEN OG SYLVAN JAKOBSEN
**LÆKNI:** ARNHOLD O. JENSEN. **FYSIO:** BÁRÐUR JACOBSEN

| | |
|---|---|
| DÓMARI | Petur **Reinert** |
| HJÁLPARDÓMARAR | 1. Regin **Egholm** / 2. Jan **Andersen** |
| 4. DÓMARI | Kári J. **á Høvdanum** |
| EYGLEIÐARI | Lassin **Isaksen** |

**BÓLTSTUÐUL:** ANNA OG PETUR LARSEN

FAROE ISLANDS

# RINKA

FINEST SALMON

CRAFTED BY ***NATURE***



**FULLKOMILEIKIN HEVUR EITT NAVN.** Hon eitur Rinka. Hon er sterk. Sjáldsama vøkur. Rinka veksur seg til í Føroyum og verður myndað av brimi og kyrru. Tað er hetta, sum ger hana til heimsins besta laks. Handfarin við nærlagni. Handfarin av náttúruni.

Hetta er Rinka. Laksur úr Føroyum frá Mowi.

**RINKA.FO**

sendistovan






teknistovan GØTA

Jens Kl. Jacobsen
Far.: jkj 232343

Henning Olsen
Far.: ho 232344

FO 510 Gøta tel. 442344 teknistovan@teknistovan.fo www.teknistovan.fo

Green Marine Divers

Tlf.: +298 77 00 60






ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo

3

LEIKARIN

# JAN Ó. ELLINGSGAARD

**TEKST OG MYND:** ATLI PETERSEN

## TÚ

**Navn:** Jan Ólavsson Ellingsgaard.
**Føðingardagur:** 26.06.1990.
**Føðistað:** Tórshavn.
**Starv:** Sølusamskipari hjá Petur Larsen.
**Pláss á vøllinum:** Miðverji .
**Yvirtrúgv:** Einki.
**3 orð sum lýsa teg:** Fair, loyalur og kappingarsinnaður.
**Torførasti mótstøðumaður:** Petur Knudsen(NSÍ).
**Frítíðarítriv:** Fyri tíðina bara húsabygging.
**Vónir fyri 2020:** Vónirnar eru góðar.

## TÍN ÍTRÓTT:

**Fyrsti dystur á 1.liðið:** Steypadystur móti Undrinum í 2007.
**Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF:** Tá eg var heilt lítil.
**Aðrar ítróttargreinar:** Dart.
**Minningarríkasti dystur:** Teir báðir dystirnir í Sarpugerði í 2010, tá vit í endanum tóku finalupláss og Europapláss frá Víkingi.
**Størstu fótbóltsliga ávirkan:** Ólavur Ellingsgaard (aka Babba).
**Besti fótbóltsleikari:** Lionel Messi.
**Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt:** Dart.

**Hvat slag av venjing dámar tær best:** Skotvenjing.
**Hvat slag av venjing dámar tær ikki:** Venjing uttan bólt.

## TÍNIR FAVORITTAR:

**Matur og drekka:** Spagetti og kjøtsós og eina cola.
**Slag av tónleiki:** 80'ara poppur.
**Sjónvarpssending:** Mr. Robot.
**At slappa av:** Hugni við familjuni ella quizkvøld við vinmonnunum.

## TROYGGJA NR. 3

**Besti fótbóltsleikari nakrantíð:** Lionel Messi.
**Sjónvarp/filmstjørna:** Leonardo DiCaprio.
**Besta bók/blað:** ÍF-blaðið.
**Stuttligasti persónur:** Trúgvi Nesá.
**Stuttligasti í hópinum:** Sjúrður Pauli Nielsen.
**Besti ÍF áskoðari:** Mamma.



# FAKTA UM JAN

Er stóribeiggi hjá Ari og systkinabarn hjá Gundur, sum báðir eru partir av fyrsta liðinum.

Selir ein Opel Wagon Z-C/SW og sambært honum, so er tað ein deiligur familju- og arbeiðsbilur.

Hevur leikt 238 dystir og fingið 21 mál í bestu deildini.




OKKARA KJARNUØKI
GRANNSKOÐAN
ROKNSKAPARHJÁLP
SKATTUR
VIRKISRÁÐGEVING
BÓKHALD
MEIRVIRÐISGJALD
Skalt tú meta um framtíðina, mást tú kenna fortíðina.
Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI
WWW.JANUAR.FO
SENDISTOVAN


Allar vanligar umvælingar
Dekksøla
Viðlíkahald
Bilverkstaðið á Kambsdali
Tlf. 441111

A Member of The Linde Group

# AGA-FØROYAR




**AGA - Føroyar/www.AGA.fo/Akranesgøta 2/FO-100 Tórshavn/Tlf + 298 - 315544/AGA@AGA.fo**



MYND: ÍF

# ÍF í hesi løgnu tíð

At ein maður í einum so fjarskotnum staði sum Wuhan, skuldi fáa so stóra ávirkan á okkara lítla samfelag, ljóðar sum eitt leikrit til ein miðal til vánaligan film, har ein maður sum til dømis Jean Claude van Damme má bjarga støðuni í heiminum. Hóast hetta kann ljóða sum ein filmur úr seinnu hálvu av áttatiárunum, so er støðan soleiðis í dag, men her er eingin „Muscles from Brussels“ at basa sóttini. Støðan er hon, at okkar lítla felag er eins hart rakt og restina av heiminum. Tó so, so meta vit ikki, at útlitini eru so døpur nú, sum tey sóu út til at blíva, tá boðini um at Føroyar lat aftur, komu av fyrstan tíð.

Felagið er bygt av fólkum, ið eru góð við felagið, og stuðulin, sum vit hava merkt í hesum tíðum, ber so sanniliga prógv fyri hesum. Áðrenn nevndin hevði viðgjørt støðuna nóg gjølla, komu boð frá leikarunum, at hesir ikki vildu leggja stein oman á byrðu, og frá søgdu sær ein part av lønini. Síðan tóku fjepparar til at keypa árskort til heimadystirnar, hóast hesir ikki vistu nær, ella í ringasta føri um, kappingin fór í gongd. Hesi bæði átøk lættu um arbeiðið hjá nevndini, og gjørdi, at vit nú fingu tíð til at umleggja ætlanirnar, sum vit høvdu lagt, nú serliga tiltøk máttu útsetast av tí vit vildu virða tilmælini frá landsins myndugleikum.

Tíðin steðgaði tó ikki upp, og vit bíðaðu eftir til kappingin kundi byrja. Fyrireikingarnar gingu væl, og vit høvdu hóp og hjálparfólk klárt til upprunaligu kappingarbyrjanina, og tað sást á øllum bráum, at menn gleddu seg at sleppa at spæla fótbólt aftur. Nú er kappingin byrjað, og vit vóna sjálvandi, at okkara felag fær eina góða gongd, tí vit hava arbeitt miðvíst seinastu árini við at hava eitt væl rikið, sunt og gott felag, sum vit øll í bygdini kunnu verða errin av. Hvørjar endaligu fylgjurnar av hesi sóttini verða, er ilt at spáa um, men fyri meg er eingin ivi um, at vit koma burtur úr hesum, hóast summar av ætlanum eru útsettar eitt sindur. Hasi lítlu átøk eg nevndi omanfyri vísir mær so mikið, at tá harðast leikar á, so standa vit saman um okkara felag.

*Magnus Jørmundsson, ÍF fjeppari og peningarøkil*

Bilasølan

Vegurin Langi 43 | 188-Hoyvík | 359700 | bilasolan.fo

.com/bilasolan .com/bilasolan



# Leiðandi reiðarí
# í norðurhøvum




VARÐIN

P/F Varðin | Garðabrekka 4 | FO-510 Gøtu | Tel 610600
vardin@vardin.fo | www.vardin.fo

Vit takka
fyri stuðulin

multiputl

Vit sveisa vinyl, gera HVS arbeiði
og putlast við alt møguligt annað …

tel. +298 207575 | multiputl@multiputl.fo


VÓNIN®
Fuglafjørður
Norðskála
Tórshavn
GREENLAND
Ilulissat
Aasiaat
Sisimiut
Nuuk
FAROE ISLANDS
NORWAY
Reykjavík
ICELAND
RUSSIA
Alta
Tromsø
Finnsnes
Svolvær
Murmansk
Torvik
Vladivostok
FAR EAST
OF RUSSIA
Siauliai
LITHUANIA
CANADA
Port-de-Grave
NÝHUGSAN
OG MENNING
AV FISKIREIÐSKAPI
TIL HEIMSINS BESTA
FISKIMANN
VÓNIN // Bakkavegur 66 // FO-530 Fuglafjørður // Føroyar
Tel +298 474 200 // info@vonin.com // vonin.com








2. UMFAR

**TEKST:** EIVIN BREIÐASKARÐ. **MYNDIR:** PALLI VANG

# ÍF-HB

## Tá ið okkara dreingir møttu HB á heimavølli síðsta sunnudag, mundu nógvir fjepparar gleða seg til at síggja nýggju liðið hjá ÍF, sum spældi sín fyrsta týðandi dyst í Fløtugerði í 2020.

Teir nýggju leikararnir smæddust ikki burtur og longu nú sæst, at teir hava dygdir, sum kanska manglaðu í fjør, tá ið kappingarárið fullkomuliga kiksaði fyri ÍF.

Lat tað bara verða sagt beinanvegin: HB vann dystin 3-1, har HB-leikararnir serliga í fyrra hálvleiki vórðu sera ágrýtnir, og eisini fingu løn fyri innsatsin.

Teir skoraðu 2 mál við høvdinum í støðum, har okkara leikarar ikki sóu ov gott út. ÍF hevur leikarar í verjuketuni, sum eiga at kunna rudda høg innlegg burtur. Tað bleiv ikki gjørt, tá ið HB skorar 2 tey fyrstu málini.

ÍF hevði onkrar góðar møguleikar í fyrra hálvleiki. Jens varð sera nær við, tá









ið hann stýrdi bóltinum framvið stongini hjá HB, og Ari hevði eitt gott langskot, sum brast á stongina og fór út í spælið aftur. Óheppið má sigast.

Seinni hálvleikur byrjaði við, at Daniel Johansen fekk sítt seinna gula kort, og harvið reytt kort. 11 ímóti 10 er ofta ein fyrimunur leikliga, og tað gjørdi eisini, at ÍF kom longur fram á vøllin og partvís fekk lagt eitt ávíst trýst á HB, men tað varð ikki fyrrenn ímóti dystarenda, at topskjúttin í Betri-deildini fekk skora til endaliga úrslitið 1-3. Eitt gott mál frá einum góðum áleypara, sum heilt sikk-urt fer at fáa nógv mál afturat í ár.

Tekur man saman um henda dystin ímóti HB, so kann staðfestast, at HB skapti 4 málkjansir og fekk 3 mál. ÍF skapti 7-8 kjansir men fekk bert 1 mál.

Skulu vit fáa úrtøku burturúr dystinum ímóti KÍ í dag, so má skorast uppá málmøguleikarnar, sum vit skapa. Málmøguleikar blivu skaptir í dystinum ímóti HB, men tíverri bleiv ikki tikið av tilboðunum.

Tað virkar sum um, at venjaraparið Hans Jørgin og Ólavur, saman við leikarunum,  hava fatur á rætta endanum, og  tí óiva fara at skapa úrslit saman, sum fara at gera, at ÍF endar nakað væl omanfyri tær plaseringarnar, sum annars hevur verið spátt.

*Spennandi verður at fylgja við ÍF í ár.*

# „Vit eru ÍF-fan“

## SYNGIÐ VIÐ

Í Fuglafirði mangan dystin leika
Í reyðum, hvítum klæðum eru tit
Á vølli allir leikarar nú reika
Og vinna dystin – ja, tað vilja vit.

**Vit eru ÍF-fan**
**Vit vita hvat ein kann**
**Vit eru best, og vinna hvat sum helst**
**Vit hava sett sum mál, at vinna hvørja sál**
**Nú Fuglafjørður hevur nátt sítt mál.**

Í deildini vit skulu verða bestir
Og vinna alt ið vinnast kann í dag
Jú, ÍF-leikarar teir eru treystir
Og fólkini tey gerast øll so glað.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Á vøllinum vit skulu standa saman
Um tað nú ikki gongur sum tað skal
Á bakkanum í álvara og gaman
Og vóna at tað gondur okkum væl.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Vit armarnar í lofti nú upp hevja
Og kunnu ikki standa her í frið
Tá sjálvandi vit gullið kunnu tevja
Nú eiga vit jú Føroya besta lið.

**Vit eru ÍF-fan ...**

**TAKKAR FYRI STUÐULIN**